## Uppsagnir hjá Conoco

Risastóra amerikanska oljufelagið Conoco Phillips hevur nú boðað frá, at fýra prosent av starvsfólkunum verða uppsøgd í næstum. Leiðslan sigur í einari fráboðan, at orsakað av fíggjarkreppuni og fellandi oljuprísi noyðist felagið at niðurskriva virðir fyri heilar 34 milliardir dollarar. Conoco Philips hevur 33.600 fólk í arbeiði. Felagið er millum annað tann størsti útlendski operatørurin á norska landgrunninum og hevur næstan 2.000 fó0lk í arbeiði har. Nøkur teirra fella fyri spariknívinum, skrivar NTB.



# jast fríggjadagin




*Christian Nagata vann heiðurin sum Ársins Leiðri 2008, og verður partur av skránni á leiðaradegnum fríggjadagin*

um førum eru fleiri evnir at velja ímillum, sigur Ása Andreasen.

Eftir at Christian Nagata hevur sett dagin, fer Jón Danielsen frá Articon at røða um »Úr skjáttuni hjá Ársins virki«, áðrenn høvuðsrøðarin, Stine Bosse fer at tosa um at »Stýra einum trygdarveitara gjøgnum fíggjarkreppuna«.

Eftir ein kaffisteðg fer Rani Nolsøe frá Íverksetarahúsinum at røða um kreativa handilsmenning, og síðani verður filmur og kjak.

Beint fyri døgurða verða so tvær ymiskar workshoppir, og eftir ein matarsteðg verða so tríggjar aðrar workshoppir.

Síðani fer kendi danski hondbóltsvenjarin, Leif Mikkelsen, at tosa um besta bygnaðin í kreppuni, og eftir enn ein kaffisteðg fer bispur, Jógvan Fríðriksson, at tosa um »Hvat eyðkennir atburðin hjá fólki í kreppu-tíðum«.

Eftir hetta verða teir fýra Ársins Leiðarar higartil, Magni Arge, 2005, Andras Róin, 2006, Marner Jacobsen, 2007 og Christian Nagata, 2008 »settir í tvístøðu«.

So er bert eina punktið eftir í skránni, og tað er at velja Ársins Leiðara, almennan og privatan.

Hetta fer alt fram á Hotel Føroyum, men klokkan 16.30 verður sonevnt afterparty í Miðlahúsinum, har til ber hjá luttakarunum at hugna sær saman undir meiri »avslappaðum« viðurskiftum.

### Sær gott út

Tað sær gott út við áhuganum í ár. Higartil líkist tað tilmeldingini í fjør, og tá vóru tey eini 220-230 fólk til dagin.

Sum tey flestu helst munnu sanna, eru føroyingar yvirhøvur seinir at melda seg til, og tá freistin er heilt fram til sjálvan dagin er ilt at gita um, men mynstrið er hitt sama í ár sum í fjør.

Tað er sjálvandi ynskiligt, at fólk melda seg til skjótast tilber, tí tað kann koma at knípa við plássi til workshoppirnar, eins og tað er gott fyri matgerðina, at fólk boða frá í góðari tíð.

Byrjað verður við morgunmati, fólk skráseta seg og fáa navnaskelti, og so gongur dagurin annars eftir skránni.

Sum nevnt verður endað við afterparty í Miðlahúsinum, og tað er sambært Ásu og Anniku sera væl umtókt.

– Tað kann vera strævið at sita ein heilan dag og fáa fakligt innput, og so kann tað vera gott at hittast undir avslappaðum viðurskiftum og tosa um annað enn fakevni, sigur Annika Andreasen.

Har verður so møguleiki fyri smakking av onkrum slagi, eitt sindur av undirhaldi og tónleikur. Og so verður eisini eitt speakers corner, um onkur skuldi havt okkurt upp á hjarta.

At enda verður dansur í Rex, um fólk skuldu havt hug at svinga eitt sindur.